# KT2004 síðurnar



Í hesum og komandi bløðum setir Sosialurin sjóneykuna á stevnuna KT2004, sum verður í Norðurlandahúsinum 22. og 23. apríl. Fyrilestrar verða umrøddir, og virkini verða lýst.

Høvuðstuðlar: Atlantic Airways, bp, Føroyar, Microsoft

# Microsoft setir fokus á trygd og vøkstur

**Microsoft vendir sær í ár til smærri fyritøkur og hevur tí fleiri verkætlanir, sum hóska til føroysk virki. Microsoft hevur umboð við á KT2004 og leggur dent á trygd og vakstrarmøguleikar við kunningartøkni**

Trygdin í kunningartøknini er av góðum grundum eitt heitt evni, sum kjakast verður dúgliga um í hesum døgum.

Framkomin virki lata støðugt sínar skipanir upp móti umheiminum gjøgnum internetið, og vit eiga altíð at umhugsa, hvørt skipanirnar eru tryggjaðar ímóti hóttanum uttanífrá, tí bæði virus og teldusníkar kunnu kosta dýrt.

— Vit á Microsoft átaka okkum ein stóran part av hesari ábyrgd. Við arbeiða miðvíst fyri at albøta trygdina í forritum og at geva kundum okkara amboð at ráða yvir, sum gera tað so lætt sum gjørligt at tryggja seg ímóti ónynsktum gestum, sigur Christian Ringheim, maknaðarstjóri hjá Microsoft Danmark, sum verður umboðað á KT2004.

Brúkarar av kunningartøkni og tey, sum taka avgerðirnar, hava eisini sjálv eina ábyrgd. Hevur tú til dømis tryggjað tær, at ein "firewall" verjir tína skipan og tíni data? Hevur tú dagført tín ritbúnað? Hevur tú eina dagførda antivirus-skipan, sum kann fanga tey virus, ið tú fært gjøgnum internet og teldupost?

Á dansku heimasíðuni hjá Microsoft (www.microsoft.dk/beskyt) fært nøkur góð ráð um, hvussu tú uttan stórvegis hóvasták kanst koma rættiliga langt við KT-trygdini. Um tú ikki ert heilt vísur í tínari egnu skipan, er tað skilagott at seta eina løtu av fyri at fylgja teimum einføldu leiðbeiningunum.

## Rætta KT-loysn

Okkurt bendir á, at munur er á, hvussu smáar og millumstórar fyritøkur gagnnýta kunningartøknina.

- Eg eri als ikki í iva um, at nógvar fyritøkur kunnu fáa greiðar kappingarfyrimunir við at fáa sær ta røttu KT-loysnina. Hava starvsfólk til dømis møguleika at arbeiða heimanífrá? Fáa kundar, veitarar og samstarvsfelagar atgongd til úrvaldar upplýsingar í tínari skipan? Kunnu tínir seljarar, ráðgevarar ella uppsetarar heinta og skráseta upplýsingar í skipanina hjá virkinum?, spyr Christian Ringheim.

Microsoft vil gjarna geva tær íblástur til at vinna meira við at nýta ta nýggju tøknina. Á heimasíðuni (www.microsoft.dk/dinvirksomhed) eru fleiri søgur at lesa um danskar fyritøkur, sum longu hava fingið hugvekjandi úrslit, tí tey hava gagnnýtt møguleikarnar við kunningartøknini.

— Møguleikarnir eru nógvir, og spurningurin er ikki so nógv hví, men í størri mun hvussu fyritøkur ítøkiliga fáa sett sjøtul á, so tey fáa mest burturúr, sigur Christian Ringheim.

Microsoft luttekur á KT2004 við fleiri starvsfólkum frá Microsoft Danmark. Umframt Christian Ringheim, marknaðarstjóra, verður millum annað Bo Martinsen, sum hevur ábyrgdina av samstarvsfeløgum.

Microsoft er at hitta í básinum hjá føroyska samstarvsfelaganum Formula.fo. Har kanst tú fáa eitt prát um, hvussu kunningartøknin best verður gagnnýtt til vøkstur í tínari fyritøku.



*Christian Ringheim, marknaðarstjóri á Microsoft Danmark, verður við á KT2004*

# Sansir geva tøknini innihald

**Tøknin fær eitt innihald, og boðskapurin fær eitt snið, sum talar til sansirnar. Heimasíðuskipanin hjá Sansum leggur stóran dent á vanligt skil og bulsterkan bygnað**

Innihaldsliga innbjóðandi, framkomin og brúkara-vinarlig. Tað eru gandaorðini í heimasíðuskipanini hjá Sansum, sum eisini eru farnir inn á KT-økið. Tað ræður um at geva tøknini eitt menniskjaligt andlit og innihald, er boðskapurin hjá Høgna Rasmussen, stjóra á Sansum.

Sansir byrjaðu sum eitt reklamuvirki í 1997. Við tíðini hevur virksemið ment seg til at fevna um aðrar partar, og í dag kalla Sansir seg eitt samskiftisvirki, ið loysir uppgávur fyri fólk. Sansir hjálpa virkjum og stovnum at bera fram boðskap sín soleiðis, at samsvar er millum samskifti og samleika.

Heimasíðan er ein náttúrligur miðil hjá stovnum og virkjum í dag. Frá einum einvegis samskifti frá virki til móttakara verða slúsurnar opnaðar fyri samskifti báðar vegir, og tí hava tvey dugnalig fólk hjá Sansum lagt stóra orku í at menna eina heimasíðuskipan, eina CMS-skipan, sum er løtt at læra og brúka.

Grundhugsanin er, at tað ikki skal vera tekniskt krevjandi at umsita heimasíðuna. Harafturat verður stórur dentur lagdur á ein greiðan bygnað. Hugsað verður logiskt og pedagogiskt, tá ið síðan verður bygd, og síðurnar verða lagaðar til ítøkiliga tørvin hjá virkjum og stovnum. Heimasíðuskipanin er bygd upp av einari grundskipan, sum kann byggjast út eftir tørvi. Vilja fólk hava ein kalendara, so fáa tey tað, men eingin orsøk er at gera ein tíðindapart, um hann ikki verður hildin viðlíka kortini.
Ein heimasíða skal eisini síggja gott út og hava eitt innihald. Tí hava Sansir ta styrki fram um onnur, at virkið hevur ein serkunnleika til at forma innihaldið. Sansir kunnu tískil geva heimasíðuni ein skilvísan bygnað og eitt snotuligt snið. Harafturat starvast fólk á Sansum, sum burturav fáast við tað innihaldsliga, bæði tekst og myndir, um tørvur er á tí.

Skipanin hjá Sansum kann arbeiða saman við øðrum skipanum. Eitt nú kann hon arbeiða saman við innanhýsis skipanum og gjaldskipanum, so til ber at keypa við gjaldkortum á heimasíðuni. Hjá Kalli kanst tú keypa á heimasíðuni, síggja nýtsluna og fylla á fartelefonina, og hjá Atlantic Airways kanst tú til dømis síggja, um flýgvarin er lendur, um hann er ávegis ella seinkaður.

Sansir hava gjørt eina serliga skipan til kommunur. Tørvurin hjá miðalstórum kommunum er kannaður í smálutir, og tí er skjótt og lætt hjá Sansum at laga nýggjar skipanir til kommunur, sum liva upp til øll krøv um opinleika og annað. M.a. Sandavágs kommuna hevur heimasíðuskipanina hjá Sansum, og nøgdsemið er stórt.
Stovnað: 1996

SANSIR

Stjóri: Høgni Rasmussen
Starvsfólk: 11
Virksemi: Heimasíðuloysnir og samskifti



# Tá ið vitan verður luft

**Nógv kunningartøkni er tann bera luft. Orðini eigur Carsten Graff, sum er ein av fyrilestrarhaldarunum á ráðstevnuni KT2004. Hann er fyrrverandi telduserfrøðingur, men gjørdist kendur, tá ið hann vendi KT-vinnuni bakið. Sjálvur er hann troyttur av at spilla tíðina við tíðarsparandi tøkni og tosar um týdningin av nærveru og hepni**

## KT-PROVO

Í tí tænarin gongur framvið okkara borði lyftir hann høvdið uppeftir. Eitt sindur pripput sum ein snobbutur, bretskur butlari.

Vit hitta Carsten Graff á matstovuni á Norðurbryggjuni. Hann ger gjøldur burturúr hvíttklædda tænaranum, sum gongur við nøsini hægst, hálar munnklovarnar niðureftir og balanserar við bakkanum á fingrasnippunum. Carsten Graff hermir og letur teg skilja, at hann heldur lítið um tað uppgjørda.

Í tíggju ár arbeiddi hann sum KT-ráðgevi og mennari av forritum. Í dag gongur hann beint hinvegin og hevur hildið einar 1300 fyrilestrar um vansarnar við kunningarsamfelagnum. Luttakararnir á KT2004 kunnu vænta sær at fáa nakrar provokatiónir slongdar í høvdið. Kanska er tað tiltrongt.

- Eg tosi um andsøgnirnar í lívinum og eksistentiellar spurningar, og mín boðskapur er, at vit skulu ansa eftir tøknini. Kunningartøknin skuldi skapa eitt pappírsleyst samfelag, men vit hava ongantíð verið umgird av meira pappíri. Kunningartøknin skuldi hjálpa okkum at spara tíð, men vit brúka meginpartin av tíðini upp á at spara tíð, og vit hava ongantíð havt meiri skund. Tess meira tíð vit vilja spara við teldum og fartelefonum, tess meira tíð brúka vit, sigur Carsten Graff.

## Vitan er vandamikil

Vitan er vald, verður ofta sagt, men vitanin kann eisini merkja, at vit missa tamarhald á okkara egna lívi, heldur Graff. Hann er órakaður, tosar seigliga, tyggir hvørt orð og sær út til at hvíla í sær sjálvum. Tað er, sum vil hann taka ferðina úr degnum, tí vit verða bumbað úr øllum ættum við kunning. Í útvarpi, sjónvarpi, bløðum, interneti, reklamum, meylum og fartelefon.

- Hvussu ber tað til, at vit vita alt og kortini hava tað ringt? Vitan skapar ikki av sær sjálvum nøgdsemi. Vit royna at systematisera okkum burtur úr øllum. Vit gera skipanir, sum leggja ábyrgdina fyri okkara lívi frá okkum. KT-fyritøkur skapa ovurstórar vónir um, hvat ein telda kann gera fyri okkum. Nógv er gott, men nógv er tann bera luft. Økt tempo merkir ikki, at vit eru betri upplýst. Mínar royndir siga, at uttan mun til, hvussu nógv tú kýtir teg at fylgja við, so ert tú altíð eftirbátur, og tað er stressandi, sigur Carsten Graff.

Sjálvur hevur hann ikki fartelefon. Hann hevur ikki internet-



samband við hús, tí tað hevði tikið ov nógv av hansara tíð. Sjónvarp hevur hann heldur ikki. Hann hevur kortini eina heimasíðu um seg sjálvan og kannar av og á eftir, um hann hevur fingið teldupost.

## Stjørna og flopp

Carsten Graff fekk sítt gjøgnumbrot við bókini »Samtaler med et træ« frá 1997. Hon fekk nógva umrøðu og ógvuliga ymiska móttøku. Danska rithøvundafelagið gav honum virðislønina fyri ársins mest nýhugsandi yrkisbók. Samstundis varð hann kosin "årets flopp" og "årets fuser" av lesarunum hjá ávikavist Politiken og Berlingske Tidende.

Undir øllum umstøðum hevur tað eydnast honum at sett spurnartekn við hálovaðu kunningartøknina. Onkur hevur verið um at sagt sítt góða starv upp eftir ein fyrilestur, og onnur fara at hugsa um klæði keisarans. Hann fær fólk at seta spurningar, sum tey ongantíð settu sær fyrr, og fær tey at flenna í kíki. At sær sjálvum.
Sjálvum dámar honum als ikki KT-stevnur. Ein rúgva av fólkum eru saman uttan at koma hvørjum øðrum við, sigur hann. Honum dámar betur at vera fyri seg sjálvan. Nú hann er í Føroyum hevur hann biðið um at sleppa at búgva einsamallur á smáplássi, og bæði Hellurnar og Koltur hava verið upp á tal sum friðskjól.

## Leitið sjálv!

Í roynd og veru er hann ógvuliga persónligur. Hann hevur skrivað sjey bøkur, sum sambært honum sjálvum allar snúgva seg um hansara egnu kata-strofur. Hansara virksemi snýr seg um so nógv annað enn kunningartøkni. Tað snýr seg um nærleika, kenslur og um, hvussu tú kanst læra teg at gerast heppin í lívinum.

Fyri ikki at styggja nakran burtur, so skulu vit heilsa og siga, at Graff ikki heldur, at allar teldur skulu blakast út gjøgnum vindeygað. Ella at fólk skulu gevast at brúka kunningartøkni. Tað ræður um, at vit ikki lata okkum blinda og gevast at elta tað innihaldsleysa. Vit skulu vera kritisk mótvegis kunningini og tøknini. Annars er vandi fyri, at vit eftir eitt langt lív siga: Vit fingu svarini, men hvat var spurningurin?

Kom og síggj Graff'in. Hann setir spurningin.

Fyrilestur í Útvarpshøllini hósdagin 22. apríl kl. 11.00

BLÁBÓK
Carsten Graff er føddur í 1962. Hann er útbúgvin Cand. merc., kallar seg livifilosof og hevur skrivað fleiri bøkur um munin millum vitan og vísdóm. Hann gjørdist kendur við bókini »Samtaler med et træ«, har hann ger upp við sína fortíð sum KT-serfrøðingur. Í bókini avdúkar hann, at teldan hvørki sparir tíð, pappír ella pengar. Hann hevur hildið meira enn 1300 fyrilestrar, og stílurin er eyðkendur ironiskur, skemtiligur og tankavekjandi.

## Skrá

Hósdagur 22. apríl kl. 10–18:

| | |
|---|---|
| 10.00–10.15: | Stevnan verður sett |
| 10.15–18.00: | Framsýningin er opin |
| 10.30–18.00: | Framløgur og evnislestrar hvønn hálva tíma í dansistovuni |
| 11.00–12.15: | Fyrilestur í Útvarpshøllini við heimspekinginum Carsten Graff um evnið: Computeren - den elektroniske sutteklud. |
| 11.45–13.30: | Kalt borð í forhøllini - tónleikur verður afturvið |
| 14.30–15.45: | Kjakforum í Útvarpshøllini um evnið: KT-vinnan og framtíðin. Umboð fyri vinnuna, almenna økið, Vinnumálaráðið og KT-vinnuna luttaka |
| 16.00–18.00: | Rekrutteringstiltak fyri miðnámsskúlanæmingar í Norðurlandahúsinum |
| 18.00: | Stevnan letur aftur |

Fríggjadagur 23. apríl kl. 10–17:

| | |
|---|---|
| 10.00–17.00: | Framsýningin er opin |
| 10.30–17.00: | Framløgur og evnislestur hvønn hálva tíma í dansistovuni |
| 11.00–12.15: | Fyrilestur í Útvarpshøllini við danska KT-trygdarbólkinum um evnið: KT-trygd - royndir frá gerandisdegnum |
| 11.45–13.30: | Kalt borð í forhøllini - tónleikur verður afturvið |
| 15.00–16.00: | Fyrilestur í Úrvarpshøllini við Preben Mejer, menningarstjóra hjá TDC um evnið: Pervasive Computing - hvussu liva vit við KT - í framtíðini |
| 16.15–16.30: | Robert Vilhelmsen, formaður í KT-felagnum tekur samanum. |
| 17.00: | Stevnan endar |
| 19.30: | Veitsla á Hotel Føroyum fyri framsýnarum og vitjandi á KT2004 við góðum mati, undirhaldi og dansi |

Meira enn eitt alternativ...
VISMA SOFTWARE SOLUTION PARTNER
*Betri fíggjarstýring fæst bert við einfaldan. Tí Visma Software. Saman við Visma bjóðar Farodane bókhalds- og fíggjarstýringsskipanir við ríkum møguleikum fyri lættliga at tillaga einstøku loysnina. Visma er serliga ætlað smærri og miðalstórum fyritøkum.*

*Visma er ein norsk risafyritøka, sum mennir og veitur fíggjarstýringsskipanir og outsourcing.*
*Visma hevur uml. 1.750 starvsfólk og umsetur árliga fyri meira enn 1 mia. DKK. Visma er millum mest nýttu fíggjarstýringsskipanir í Noregi og eru fleiri enn 150.000 Visma kundar í øllum Norðurlondum.*
FARODANE
Brekkutún 4, FO -100 Tórshavn, Tel: +298 31 14 14, Fax: +298 31 75 34
www.visma.dk
www.farodane.fo